# Felags bátalívið ríkar okkum øll

**Felagslív á báti so væl sum millum bátar kann vissuliga ríka lívsins fjølbroytni, samskifti og samlív í breiðastu merking og øðrvísi enn í gerandisdegnum, har vit mangan liva lívið meira og minni parallelt og hvør í síni egnu verð segði Eyðun Joensen, sálarfrøðingur og bátamaður, tá bátaárið varð sett í Vágsbotni seinasta leygardag**



*At bátamentanin fevnir um bæði kynini og øll ættarlið fingu vit prógv um, tá hundraðtals fólk høvdu leitað sær í Vágsbotn seinas*

*Lagt til rættis og myndir: Jan Müller*

*Eyðun Joensen*

Góðu bátafólk, góðu áhoyrarar.

Tórshavnar bátafelag hevur seinnu árini markerað byrjandi summarsiglingina við hesum Mjáflaggahugna, har bátar vinda felagsins vimpul í húnar hátt, loysa ein stuttan túr, og fólk aftaná hugna sær saman her í Vágsbotni.

Og hvat tá?

Tað várar og tað við lít, hóast nakað kølið beint í løtuni.

Farið er um summarmála og vónríku páskirnar. Ljósið vinnur á myrkri. Flytifuglar og aðrir summargestir søkja aftur til landið kropp á kropp.

Uppvaksin í sjóvarmálanum minnist eg væl aftur á hendan serliga várhugnan, tá bátafólk riggaðu til summarið og vanligi fjøruroykurin blandaðist vid anga av máling, tjøru og fernisi. Tá var av sonnum summar í hondum.

Og somuleiðis minnist eg havnarmenn fjasa við sínar smáu bátar her skamt frá innast í Vágsbotni, har eitt vítt træverk stóð við bátum uppiá. Síðani er mangt og hvat broytt í býarmyndini, tó at nakað av hesum vár- og summarstemningi enn er úti í Álakeri og við bryggjukantarnar.

Mentan verður ofta gjørt til eitt óneyðuga fínt og torskilt, fjart hugtak, okkurt við Norðurlandahúsinum fínmentan á Debessartrøð, men mentan merkir heilt einfalt: "mátin, sum hin einstaki og fjøldin annars velur at nøkta sínar tørvir uppá til likams, sálar, sosialt og andaliga".

Tú kanst eisini kalla tað lívsinnihald, lívsstíl, lívsdygd, og alt sum ríkar tær gerandisdagin og lívið, og í so máta er ongin mentan fínari enn onnur.

Íðan, er so bátalív, tað at eiga, eiga part í, fjasa við bátar og at vera í báti so eisini mentan?

Jú, so er. Bátalív er fyri mong, og vísir tað seg eitt støðugt vaksandi fólkameingi, bæði menn og kvinnur og børn fullgyldug mentan javnbjóðis øðrum mentanarmøguleikum og gjarna afturat øðrum atkomuligum mentanartilboðum.

Sjálvur dámar mær óføra væl at reika her niðri við sjóvarmálan, at hava bát og at flota, hóast tað við árunum hjá mær sum hjá so mongum mest avmarkar seg til at rigga til og av.

Men sjálvt tað sindrið og at hyggja til bátin er eisini mentan, tí sjáldan í lívinum møtir tú so nógvum øðrvísi og fjølbroyttum fólkum, sum møta tær so blíð, nærverandi, fyrikomandi og hjálpsom.

Jú, vissuliga kanst tú í bátaumhvørvinum fáa øðrvísi og nýggjar vinir og samskifti at ríka tær lívið við fyri ikki um at tala í grindabýti, har tað upp á forhond ongantíð er givið, hvørjum kompagnii tú endar í.

Eg nevndi "samskifti", hetta gandaorðið, sum sigst vera satt balsam fyri meiningsfulla samveru, og allahanda serfrøðingar reika landið runt at læra okkum at samskifta, veri tað seg í parlagnum, í familjuhøpi so væl sum í arbeiðshøpi.

Jú, samskifti er gott og neyðugt, tó tað í mínari verð er neyðugt at hava ella finna sær nakað felags gevandi at samskifta um og ítøkiliga at vera saman um.

Og tað finna eg og mong bátafólk við mær júst her niðri við sjóvarmálan og í tí maritima umhvørvinum við felags áhugamálum, har tað ber til at skifta orð um annað og øðrvísi, enn tað, sum ein var bundin at í arbeiðslívinum.

Tí frøir tað meg eisini, at tað ikki longur bara eru serskøltar sum eg sjálvur, sum hava bát og flota, men heil húski og familjur, kvinnur, menn og børn, sum eru saman um og ofta saman á báti, har eisini trygdin verður sett høgt.

Bátafestivalarnir á sumri kring um landið eru vorðnir sum smáar ólavsøkur við nógvum nýggjum samskifti og sínamillum blíðskapi.

Slíkt felagslív á báti so væl sum millum bátar kann vissuliga ríka lívsins fjølbroytni, samskifti og samlív í breiðastu merking og øðrvísi enn í gerandisdegnum, har vit mangan liva lívið meira og minni parallelt og hvør í síni egnu verð.

Jú, skulu vit hava betri og fjølbroyttari samskifti, skulu vit finna nakað og helst fleiri áhugadeplar at vera saman um, og í so máta kann felags bátalív vera ein góður møguleiki av fleiri.

Lívið skal livast, meðan tú enn hevur tað og tíni og møguleikarnar til tess. Latið ikki gyltar lívsmøguleikar fara óbrúktar aftur við borðinum, men brúkið teir hvørt til sínar náir og við ábyrgd og sóma.

Og so er lívið eisini ein røð av upplivingum úr enda í annan.

Seinastu mongu árini hevur verið eitt vaksandi maritimt áhugarák aðrastaðni og umsíðir eisini her hjá okkum.

Fólk hava fingið eyguni upp fyri maritimari mentan, tí maritima samleikanum og maritimari mentanarsøgu.

Føroyingar søgdust føddir við ár í hond, men seinru árini hava alsamt fleiri føroyingar fingið



*Karni Olsen, formaður í Bátafelagnum í Havn kann bara fegnast um stóra áhugan fyri bátamentanini*